Nakrar hendingar í 1977...

Vit tríva í nakrar hendingar, ið fóru fram um sama mundið, sum SMS lat upp á fyrsta sinni

Ishkov vitjaði í Føroyum

Tað gongur við rúkandi ferð eisini í tí partinum av heiminum, sum fyri fjórðings øld síðani var eystan fyri jarntjaldið. Gamla Sovjetsamveldið tóktist fyri 25 árum síðani at vera púra óavrikað av restini av heiminum. Kommunistarnir ráddu fyri borgum, og tað var sera torført at ímynda sær, at bara tíggju ár seinni skuldu rembingarnar verða heilt stórar, sum Gorbatjov skuldi standa á odda fyri, og at broytingarnar skuldu gerast so stórar og ógvusligar, at samveldið skuldi verða liðað sundur.

Tí tóktist tað vera umboðsmaður fyri ein heilt annan heim, sum vitjaði í Føroyum, tá sovjetiski fiskimálaráðharrin, Alexander Ishkov, í november í 1977 vitjaði her á klettunum. Saman við honum vóru fleiri umboð fyri Sovjetsamveldið, eitt núsend-imaðurin í Keypmannahavn.

Undir vitjanini varð ein fiskivinnuavtala und-irskrivað, sum skuldi verða rammuavtala um framtíðar samráðingar millum Sovjetsamveldið og Føroyar. Teir, sum skrivaðu undir fyri Føroyar, vóru Atli P. Dam, løgmaður, og Leif Groth, sum var ríkisumboðsmaður tá.

Fremmandu menninir vitjaðu á fleiri fiskavirkjum kring landið, og teir vóru eisini og løgdu krans við minnisvarðan yvir sjólætnar í plantasjuni í Havn.

Løgtingshúsið varð umvælt

Í ár hevur løgtingshúsið verið umvælt og gjørt av nýggjum. Tað var tað eisini fyri einari fjórðingsøld síðani. Í 1977 varð løg-tingshúsið umvælt og nýmótans gjørt. Salurin varð snaraður 90 stig. Nú er hann aftur snaraður 90 stig. Undan umvælingini í 1977 vóru formaðurin og talarapallurin í sama enda, sum teir nú eru. Tað vil siga, at í tveimum stigum er tingsalurin seinastu fjórðingsøldina snaraður fyrst 90 stig og so 90 stig aftur aftur – fyri at koma upp á pláss aftur í suðurendanum.

Í 1977 varð alt innbúgvið skift út. Nýggja innbúgvið varð gjørt á snikkaravirkinum hjá Karl Hansen, sála, í Klaksvík. Har høvdu teir smíðað 41 borð til tingmenn og landsstýrismenn, røðarapall og formanspall og borð til fundarhøli og køkskrók á loftinum. Stólarnir vórðu keyptir aðra staðni frá, og kostnaðurin av øllum tí nýggja innbúgvinum lá ímillum 250 og 300 túsund krónur.

Petur Christiansen, borgarstjóri í Havn, handa unga fuglfirðinginum, Alexanduri Kristiansen, M. A. Jacobsen virðislønina

Kendir menn fingu M. A. Jacobsens virðislønirnar

Tá M. A. Jacobsens virðislønirnar vórðu handaðar 6. november í 1977, var tað Petur C. Christiansen, býráðsformaður, sum vegna Tórshavnar býráð handaði kekkarnar upp á átta túsund krónur hvør og heiðursskjølini. Petur C. Christiansen er pápi Jan Christiansen, sum nú er býráðsformaður í høvuðsstaðnum.

Tríggjar heiðurslønir vórðu handaðar. Sigurd Joensen, sáli, fekk heiðurslønina fyri barnabókmentir. Jeffrei Henriksen fekk heiðurslønina fyri yrk-isbókmentir, og Alexandur Kristiansen fekk heiðurslønina fyri fagrar bókmentir.

Suðuroyingar fingu ellisheim og minnisvarða

Leygardagin 5. november í 1977 varð Suðuroyar Ellis– og røktarheim vígt. Tað var Eivind Vilhelm, sáli, sum tá var varðabispur, sum vígdi heimið. Umframt varðabisp, so vóru tveir aðrir prestar við til vígsluna. Tað vóru prestarnir, sum tá vóru í Suðuroy. Elsa Funding, sum nú er prestur á Viðareiði, var prestur í Hvalba, og Martin Restorff Jacobsen, sum nú er prestur á Nesi, var prestur í Vági.

Suðuroyar Ellis– og røktarheim rúmaði 28 búfólkum, tá tað varð tikið í nýtslu.

Sunnudagin 6. november í 1977 varð minnisvarði yvir sjólætnar í Vágs sókn avdúkaður. Tað var elsti maður í býnum, Alexander Vilhelm, sum avdúkaði minnisvarðan. Fyri fjórðings øld síðani vóru 120 nøvn á minnisvarðanum, sum er gjørdur úr koparplátum. Nøvnini eru á teimum, sum eru sjólætnir síðani tíðina hjá Nólsoyar Pálli, á eitt nú nøvnini á teimum, sum eru falnir í bakka og bjørgum.

Minnisvarðin kostaði 120 túsund krónur. Umframt sjálvan minnisvarðan, so var nógv gjørt við at fríðka økið rundanum.

Havel handan rimarnar

Forsetin í Kekkia eitur Vaclav Havel. Fáur mundi fyri einari fjórðings øld síðani ímynda sær, at hesin rithøvundurin skuldi gerast statsleiðari og ímyndin av stríðnum fyri at fáa fólkaræðisliga stýrisskipan og bardaganum fyri at varðveita skipanina í Kekkia.

Í 1977 sat Vaclav Havel handan rimarnar. Hann varð fongslaður, tí hann var høvuðsmaðurin í Charter 77, sum stríddist fyri størri menniskjaligum frælsi og rættindum í kommunistiskt stýrda Kekkoslovakia, sum tað tá æt.

Í 1977 løgdu handverkarar síðsu hond á løgtingssalin, sum var settur í stand og nútíðargjørdur – og í ár, 25 ár seinni, er hann aftur fingin í gamlan stíl, so har er rættuliga viðvent í holuni…

Skráin:

Mánadagin 4. til leygardagin 9. novembur:
Rasmus Rasmussen listaframsýning á Torginum

Týsdagin 5. til leygardagin 9. novembur
Mango á Torginum

Fríggjadagin 8. og leygardagin 9. novembur
Flykran og Fríðkan á Torginum

Týsdagin 12. novembur
Nósabarnaprix 2002 á Torginum. Finalistarnir framføra løg av nýggju fløguni. Eisini signera teir fløguna. James og Angela undirhalda.

Mikudagin 13. til mikudagin 20. novembur
Myndaframsýning »SMS 25 ár«

Hósdagin 14. til leygardagin 16. novembur
Føroya Tele sølu-framsýning á Torginum

Fríggjadagin 15. og leygardagin 16. novembur
Sportmaster á Torginum

Fríggjadagin 22. og leygardagin 23. novembur
Kall søluframsýning á Torginum

Týsdagin 26. novembur
Kl. 16.00: Stóra jólaframsýningin á Torginum verður tendrað

Dagførd skrá fyri tiltøk í SMS er á www.sms.fo http://www.sms.fo

ALLIR VEGIR FØRA TIL SMS

Skeiðsdepilin fyri

strongd í útnorðri

ke s e l n
s n n

Vit eru fegin um at kunna bjóða tygum vælkomnum til Skeiðsdepilin fyri strongd í útnorðri, sum hevur høvuðssetur í Føroyum.

Skeiðsdepilin í útnorðri er ein sjálvstøðug eind av Center for stress í Danmørk, sum í fleiri ár hevur undirvíst í leiðslu, sálarligum arbeiðsumhvørvi, arbeiðsgleði og strongd á einum ótali av fyritøkum, felagsskapum og stovnum.

Í hesum sambandi verður skipað fyri skeiði í Føroyum.

Tað verður:
e a a n n e e kl l
s a n

Á skránni:
n a e s le l s

Skeiðið vendir sær til øll, sum vilja hava størri arbeiðsgleði. Somuleiðis vendir skeiðið sær til fyristøðarar, sum ynskja sær størri innlit í tað starvandi menniskjað fyri á henda hátt at fáa fatan av, hví summi starvsfólk bera seg at, sum tey gera.

Skeiðið er sostatt á tremur við góðum amboðum til at bøta um arbeiðslívið.

Kanningar í Danmørk og Evropa vísa týðiliga, at tað, sum skal til fyri at halda fast við starvsfólkið, er eitt gott sálarligt arbeiðsumhvørvi. Tað er tað, sum flestu starvsfólk raðfesta fremst viðv. arbeiði teirra.

Undirvíst verður í strongd, sjálvstileggjan, starvsførleika, samskifti, arbeiðsgleði og støðisligari samskipanarsálarfrøði.

Tann, ið undirvísir á hesum skeiði, er **as l s e**, sum er fyristøðari á Center for stress í Danmørk. Prísurin fyri eitt dagsskeið er 1.500 kr. íroknað kostarhald.

Harumframt er møguligt at fáa Thomas Milsted út á fyritøkur til eitt innanhýsisskeið, um ein hevur hug at skipa fyri einum dagsskeiði fyri starvsfólkinum á staðnum.

Fyri at tekna seg til skeiðið *Strongd, arbeiðsgleði og lívsvirði* vinaliga sendið teldupost til: stress@kursus.dk ella ringið á tlf. 0045 33 37 95 05. Umboð í Føroyum er Kim Petersen

Meiri om Skeiðsdepilin í útnorðri
en e s ess k

Veðrið Sosialurin Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir

en a la
Fólkaskúladeildin

s l a al ka k la

a s s l a al ka k la e l s le s l se ana e a

k la e n n a an sk lan l a a s a as sk lan

øk e e s al a a s
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum og hevur hugsjónir um skúlamenning
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

a a skal s l a n
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum skúla og heim
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- vera førur fyri at røkja og menna starvsfólkasamstarvið
- vera førur fyri at útinna starvsfólkaleiðslu
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

ø le kak ø
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

øna se ana e
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum í Streymoyar skúladømi II við fyribils tænastu í Hvalvíkar skúla, og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkunum 27.3, 29.1, 31.1 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

s kn
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Mentamálaráðnum, skal vera Mentamálaráðnum í hendi **se nas a la s a n n e e**

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

5. november 2002

en a la
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 355050 · Fax 355055
e-postur: MMS@MMS.fo

en a la *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

n
s knas e

Til eitt av starvsfólkum okkara sóknast vit skjótast eftir íbúð, helst nærindis miðbýnum.

Vendið tykkum til tlf. 311320/217593 Bo. M. Hansen.

e ssa økan
Dr. Jakobsensgøtu

ALVAL
Kai-økið - Postsmoga 107
FO-800 Tvøroyri
Telefon 372186

egna l ting ava vit st ngt ølunum
kkara rav karl r gg adagin in
n vember it lata u a tur
ø rum ølum á kai økinum mánadagin
in n vember

Í BÝIN – HVØNN HÓSDAG

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo